Væl eydna› stórkapping í fimleiki

Fimleikur: Fimleikafelagi› Ljósi› vann tvær av teimum trimum kappingunum í væleydna›u stórkappingini í fimleiki sunnudagin

JÁKUP MØRK

Sunnudagin var stórkapping í rútmiskum fimleiki hildin í ítróttarhøllini á Hálsi.

Kappingin var› skipa› í tríggjar bólkar: Pinkur, smágentur og gentur. Umframt hesar tríggjar kappingarnar var eitt li› vi› hjá kvinnum úr HF, og tískil var ikki talan um kapping, men ein stø›ismetan var givin.

Kappingina hjá pinkum vann HF vi› 8,95 stigum, Ljósi› gjørdist nr. 2 vi› 8,25 st., Støkk kom á eitt tri›japláss vi› 7,25 st. og Fok gjørdist nummar f‡ra vi› 5,95 st.

Aftaná pinkur komu smágentur inn á gólvi› vi› eini fríari seriu og eini seriu vi› hoppibandi. Hendan kappingin gjørdist sera hør› ímillum øll tr‡ feløgini, men tá i› avtorna›i vann Ljósi› vi› 16,45 st. Støkk og HF vóru jøvn vi› 16,25 st. hvør, men av tí at høvu›sdómarin hev›i givi› Støkk fleiri stig, var› ta› hetta li›i›, sum gjørdist nr. 2 og HF gjørdist sostatt nr. 3.

Í kappingini hjá gentum var kappast í fríari í›kan og eini ambo›sseriu, sum í ár var vi› bólti. Í hesi kapping enda›i Ljósi› á einum fyrsta plássi vi› 33,75 stigum. Nr. 2 gjørdist HF vi› 32,70 st.

Aftaná genturnar komu kvinnur úr HF inn á gólvi›. Sjálvt um talan ikki var um kapping hjá teimum, av tí at tær ikki høvdu nakran at kappast ímóti, vístu tær hvussu høgt stø›i› er innan kvinnufimleik í Føroyum. Tær fingu samanlagt 33,3 stig fyri ávíkavist eina fría seriu og eina seriu vi› vimpli.

Væl avgreidd kapping

Sum heild gekk væl at fáa kappingina avgreidda. Byrja› var› klokkan tr‡, og kappingin hjá pinkum og smágentum var li›ug uml. kl. 17 Sí›ani var hildi› áfram vi› gentum og kvinnum, og hendan kappingin var› li›ug kl. 18.30.

Fyri at stytta um bí›ití›ina hjá ásko›arunum vóru nøkur frams‡ningarli› og s‡ndu fram me›an stø›i› fyri hvørja kapping var› lagt. Ta› tekur eitt sindur av tí› hjá dómarunum at koma fram til tey endaligu úrslitini, og tískil er stórkappingin ikki so ásko›aravinarlig, sum a›rar kappingar. Hetta sást tó ikki aftur í ásko›aratalinum, tí tá ta› kom til stykkis, vóru eini 600 atgongumerki seld.

Tveir danskir dómarar vóru komnir heim at hjálpa til vi› dømingini í ár, og sigast má at hesin parturin av kappingini gekk væl.

Úr FFS ver›ur sagt, at ta› er trupult at stytta kappingina munandi, men ta› at frams‡ningarli› eru vi›, hevur bøtt naka› um bí›ití›ina hjá ásko›arunum.

Høgt stø›i

Ta› sæst t‡›iligt, at fimleikarar venja nógv til kappingina, og venjararnir gerast betri fyri hvørt ár. Úr Fimleikasambandinum ver›ur sagt, at stø›i› í stórkappingini hækkar nógv fyri hvørt ár.

Hesi seinnu árini er ta› kanska serliga hjá teimum yngru li›unum at munandi framgongd er gjørd. Hetta kemur helst av, at fimleikafeløgini sum heild hava trupult vi› at finna lei›arar til tey eldru li›ini til slíkar krevjandi kappingar.

Vónandi er hetta naka›, sum ver›ur broytt til næsta ár.